# 200 ár við skitnum

## Orrustan millum John McCain og Barrack Obama hevur verið rættiliga tom, um vit skulu meta saman við onnur forsetavalstíð í amerikonsku søguni

FORSETAVAL
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*


*Al Smith*

Seint í kvøld stendur greitt hvør gerst forseti nr. 44 í amerikonsku søguni, Barrack Obama ella John McCain. Obama og McCain hava verið rættiliga bersøgnir um hvønn annan, og hava eftir mangra tykki brúkt rættiliga stór orð, men sammett við fleiri onnur forsetavalstríð í amerikonsku søguni, so er valorrustan millum Obama og McCain avgjørt millum tær meiri virðiligu og fólkaligu, sum hava verið í meir enn tvær øldir.

### 1800:
### Stungin í ryggin

Í árinum 1800 kappaðust táverandi forsetin, John Adams og Thomas Jefferson um at gerast forseti í USA. Og satt siga, so hevði Thomas Jefferson ræðuliga niðrandi vendingar um mótstøðumannin, John Adams. Orðalagið var so grovt sum: "stórur hyklari", "ein frástoytandi pedantur" og "John Adams er ein vemmiligur hermafroditur, sum hvørki hevur styrkina og støðufesti hjá einum manni, tíansheldur mildleikan og gløggsemi hjá einari kvinnu!" Adams svaraði aftur, at Jefferson sum hevði verið varaforseti hjá honum, hevði sum sakførari lumpað fleiri av sínum viðskiftafólkum, og undir amerikanska frælsisstríðnum hevði Jefferson verið ein ræðuskítur. Jefferson varð ein ateistur, sum vildi umskrivað Bíbliuna, og haraftrat fór hann í song við trælum sínum. "Jefferson er ein primitivur og óndur persónur. Hann er sonur ein hálvblóðs-indianara, og ein mulat!" skrivaði Adams í einum faldara. Men ein maður í leguna hjá John Adams stakk hann í ryggin. Alexander Hamilton hataði Adams, og gav ein bókling út, har tað stóð at lesa, at Adams var "sjúkliga øvundsjúkur" og "ræðuliga sjálvssøkin". Bóklingurin kom víða kring USA, og endin var, at Thomas Jefferson vann ein stórsigur.

### 1828:
### Lygnari og tjóvur

Í 1828 varð sonur John Adams, táverandi forsetin, John Quincy Adams – kendur frá søguni um trælaskipið "Amistad" – partur av einum skitnum valstríði. Demokraturin, Andrew Jackson nevndi Adams ein antireligiøsan, bretsktsinnaðan og kongatrúgvan forseta, sum bara hevði korrupt fólk í sínum starvsliði. Repuplikanarnir og John Quincy Adams løddu skjótt sínar skitnu kanónir. Teir góvu eina heila bók út, um hvussu ótrúgvur Andrew Jackson hevði verið tey 37 árini hann hevði verið giftur. Bókin nevndi eitt ótal av frillum, sum teir søgdu Jackson hevði havt. Haraftrat nevndu repuplikanarnir Jackson ein slagsbróðir, ein fordruknan hasardspælara, ein lygnara og trælahandlara. Kona Jackson, Rachel hevði verið gift áður. Mótstøðumennirnir kallaðu hana eina skitna skøkju. Andrew Jackson vann tað skitnu orrustuna, tá saman um kom. Men kona hansara var hjartaknúst av øllum leysasøgunum, repuplikkanarnir høvdu sett í gongd, og stutt aftaná valorrustuna doyði Rachel Jackson av sorg.

### 1860:
### Báðir skírdir at verða mishættir

Valdysturin í 1860 gjørdist tann seinasti, áðrenn amerikanska borgarakríggið brast á í 1861. Trælahaldið var høvuðsevnið í valdystinum ímillum repuplikanaran, Abraham Lincoln – sum var ímóti trælahaldinum - og demokratin, Stephen Douglas – sum var fyri trælahaldinum. Valdysturin kom ikki so nógv at snúgva seg um sjónarmiðini hjá valevnunum, men meiri um útsjóndina hjá teimum. Douglas var bara 151 cm høgur, og vóru nógvar skemtisøgur smíðaðar um hansara vesaligu støðd, hansara ómansligu útsjónd og høgu rødd. Repuplikanskú bløðini skrivaðu niðrandi: "Stephen Douglas er fimm føtur og einki, og hann er líka breiður, sum hann er høgur!"

Demokratisku suðurstatsbløðini fóru líka illa við Abraham Lincoln, sum var heili 192 cm høgur. "Hann er eitt ræðuliga mishátt vesalavætti. Hann er døkkur, og minnir um ein brotsmann. Hann er ein blandingur av einum handilsmanni, hestatjóvi og einum lokumstømara! Í suðurstatinum blivu plakatir settar uppá allar veggir, har ein kundi síggja Lincoln verða bornan inn á eitt sinnissjúkrahús av sínum viðhaldsfólkum, trælum og anti-trælahaldsfólkum. Tá saman um kom vann Lincoln, við tí úrslitið, at suðurstatirnir vildu loysa seg frá sambandsríkinum. Á vári í 1861 brast kríggj á millum norður- og suðurstatirnar.

### 1876:
### Morð og tjóvarí

Í 1876 kundu amerikumenn hátíðarhalda 100-ára dagin, sum sjálvstøðug tjóð, men forsetavalstríðið hetta jubileumsárið varð lítið hátíðarligt. Demokratiska valevnið, Samuel Tilden fekk rithøvundar at snikka søgur saman um repuplikanska valevnið, Rutherford Hayes. Í søgunum varð Hayes ákærdur fyri at hava skotið mammu sína í fyllskapi. Hann hevði framt undandrátt, og hann hevði stjolið 400 dollarar frá einum deyðadømdum hermanni undir amerikanska borgarakrígnum.

Legan hjá Hayes svaraði aftur, har teir ákærdu tann ógifta Tilden at hava verið saman við einum ótali av giftum kvinnum, og fyri at verða smittaður av tyfilis, tí hann hevði verið saman við einari írskari skøkju. Tilden og demokratarnir vóru eisini sagdir at verða orsøk til amerikanska borgarakríggið. "Øll tykkara arr og tykkara sár eru demokratarnir orsøkin til!" skrivaði eitt repuplikanskt blað. Sjálvt valið varð merkt av valsviki og ruðuleika. End-